# Svend Auken



Tað er altíð hart at hoyra tá vinir frá ungdómsárunum doyggja. Tá minnast vit tað gamla orðið, at einki er so vist sum deyðin, men einki so óvist sum deyðastundin.

Svend Auken og eg komu at kennast tey árini vit lósu á universitetinum í Århus. Hann kom nakað seinni enn eg, men vit vóru so fá, sum tá lósu stjórnmálafrøði, at vit øll komu saman.

Samstarvið okkara millum beginti tó ikki so væl. Vit lesandi høvdu gjørt okkara egna felag, har eg var komin í nevndina og var blivin skrivari. Vit skipaðu fyri einari ferð til Berlin, og vit fingu avtalu um ein fund við yvirborgmeistaran. Hann æt Willy Brandt, og hevði beint verið í Amerika og har havt fund við forsetan John F. Kennedy. Svend kom ikki til Århus fyrr enn ein mánað eftir at lestrarárið beginti. Hann hoyrdi um hesa ferð og vildi eisini koma við, men tá var longu gjørt av hvørji 25 skuldu sleppa, so hóast hann bønaði og bað meg um at taka seg við eisini, bar tað ikki til. Hann kom so at heilsa fleiri ferðir seinni upp á Willy Brandt, so skaðin var ikki so stórur, men tað kundi hvørki hann ella eg vita tá.

Hann var eitt flogvit, og var ein altíð góður at vera saman við. Einaferð fekk eg høvi til at heilsa upp á familju hansara, og tað var ein løgin søga. Eins og í dag vóru pengar ikki nógvir millum studentar tá í tíðini. Ein dagin lænti hann 10 krónur frá mær, og hvørja ferð eg spurdi eftir teimum, lovaði hann at geva mær tær aftur. Einaferð vit vóru staddir í Keypmannahavn bað hann meg koma heim til sín eftir pengunum. Tey vóru øll bæði blíð og týð. Mamma hansara var tó ikki heima. Hon hevði verið nógv frammi í fjølmiðlunum, tí hon var eins og faðirin lækni og hevði skrivað ritgerð um seksuella atburðin hjá ungum kvinnum. Tey vóru mikið blíð, bæði faðir hansara og tey fýra systkini. Eg fekk tó onga tíggjukrónuna har, men hann bað meg koma við sær til eini onnur hús, har ein vinkona hansara búði. Hetta var onkrastaðni á Carlsbergverksmiðjuni, og hann bað hana geva mær pengarnar, og tað eru so fyrstu pengar, eg fekk frá Carlsberggrunninum, alt Svend fyri at takka.

Tá eg seinni ferðaðist um Keypmannahavn, ringdi eg viðhvørt til hansara, og eina ferð møttust vit á Christiansborg og fóru á Skarv aftaná. Hann var sera bilsin av at uppliva eitt slíkt vertshús í Keypmannahavn. Hann visti um italsk og griksk vertshús í býnum, men at tað eisini var eitt føroyskt, hevði hann als einki hoyrt um.

Hann var ikki av føroyskari ætt, men við giftu hevði familja hansara eitt sindur við Niels Finsen at gera, og morbróðir hansara hevði verið lækni í Føroyum og skrivað eina doktararitgerð um psoriasis út frá føroyskum tilfari. Hann vónaði at koma til Føroya at vitja sum politikari, men tað gekk illa. Tá hann so endiliga kom higar var tað sum fylgisneyti hjá konu síni Bettinu Heltberg. Mamma hennara kendi William Heinesen, og tá hann fylti níti, sendi Politiken Bettinu til Føroyar at skriva um føðingardagin, og tey vóru bæði við í kyndlagonguni Williami til heiðurs. Hann var avbera glaður fyri at vera her, sjálvt um januar ikki er besta ferðamannatíðin.

Síðani hava okkara leiðir ikki borið saman, men vit hava skift brøv, og eg hoyrdi eina samrøðu við hann á Rás 2. Tá tóktist hann birgur, sjálvt um hann hevði viðurkent alment, at hann hevði fingið krabbamein í bløðruhálskertilin, og at eingin vón var um bata. Hann leit deyðan beint í eyguni og ræddist ikki. Slíkir menn hava virðing uppiborna.

**Zakarias Wang**

# Minningarorð um Petur Paula Petersen

**06.08.69 – 29.04.2009**

Hin 29. apríl komu tey feigdarboð, at javnaldurin og fróðarmaðurin, Petur Pauli Petersen, hevði verið fyri tí vanlagnu at doyggja í einari arbeiðsvanlukku í Danmark.

Tá ið ein fær slík boð, stendur heimurin stillur, og øll meining hvørvur. Lívsins lýti nema ein innast í sálina, og ein tungur tankaburður tekur við. Minnini verða sett í gongd, og fram trína allar tær góðu løturnar saman við Peturi. Tankarnar fara til teirra, ið eftir sita. Tey, ið hvønn dag skulu merkja longsulin, tregan og pínuna, ið stendst av slíkum hóttafalli.

Petur var altíð eitt lívsstykki. Ein fróðarmaður, ið altíð visti frá onkrum stuttligum at siga frá. Har, sum Petur var, var lívligt og stuttligt at vera.

Sum piltur hevði hann eina smittandi framferð, ið ikki var til at koma uttanum. Hann var ágrýtin, raskur og altíð í góðum lag. Henda eginleikan bar Petur við sær alt lívið. Hóast vit nú eru í árinum, har vit øll fylla 40 ár, og hóast dagar her millum okkum ikki gjørdust so drúgvir, so høvdu teir ein ovurstóran týdning fyri, at vit hava ment okkum til tey, vit eru í dag.

Vit verða uppald á trimum pallum. Ein uppaling fer fram heima. Har fekk Petur nógv gott. Pápin er fróðligur maður, og mamman rólig. Teir tríggir beiggjarnir og systirin og Petur vóru sum systkin eiga at vera; viðhvørt klandraðust tey og viðhvørt ikki, men alt endaði tó altíð í sátt og semju. Altíð var hann fúsur at taka ein hond við í arbeiðinum fyri at lætta um hjá foreldrunum. Saman við Beintu fekk Petur fitta sonin Bóga, sum hann elskaði yvir alt her á jørð. Hann kendi seg heilan saman við Boga.

Onnur uppalingin fer fram millum floksfelagar. Petur var ikki lættur at vera óvinur við. Hann hevði tað í sær, sum so fá hava, at hann ikki læt nakran ganga leingi og bera agg til nakran. Hann var eitt so sinnisliga opið og lívligt menniskja, at hann kundi tosa við øll, sama um hann kendi tey ella ikki. Hann segði tað, sum hann meinti, og væl dámdi honum at kjakast um alt millum himmal og jørð. Oftani gekk kjakið hart fyri seg. Tá ið vit plagdu at kjakast í Meginskúlanum um, hvørjir sjómenn vóru teir betru: sandingar, skopuningar, skálavíkingar, húsavíkingar ella dalbingar, visti hann altíð eina góða søgu um onkran raskan sjómann antin úr Skopun, haðani mamman er ættað, ella av Sandi, haðani pápin er ættaður.

Triði pallurin, har uppalingin fer fram, er millum vinir. Petur hevði nógvar vinir. Teir vinirnir, sum hann hevði, vóru vinir hansara fyri lívið. Hann visti altíð, hvar ið øll vóru stødd, og hann gav sær altíð stundir at práta og spyrja um hvussu og hvat.

Hesir tríggir pallarnir, har vit verða uppald, er tað, sum ger okkum til tann, ið vit eru. Petur hevur havt sín stóra leiklut á hesum pallum, og eru vit serstakliga takksom fyri at hava kent Petur sum okkara kæra skúlafelaga og vin.

Petur legði doyðin á, at bera hesar tríggjar pallarnar við sær og føra teir víðari til sonin.

*Sorg og gleði saman fylgjast*
*søtt og beiskt er bland mær lutast,*
*blandað mær í lívsins skál,*
*slíkt er alt mítt ævimál.*

Kingo
J. Dahl týddi

Friður og fríðir tankar fylgi minninum um okkara kæra vin Petur Paula Petersen.

**Floksfelagarnir í Sandoyar Meginskúla**





Føðingardagar · Starvsdagar · Minningarorð

**Fært tú ikki tikið teg saman?**

Hugsar tú um at seta eina heilsan í blaðið í sambandi við onkran merkisdag í familjuni ella hjá arbeiðsfeløgum. Her verður eitt nú hugsað um rundar dagar, føðingardagar, gullbrúdleyp, starvssetanir, jubileum á arbeiðsplássinum o.s.v.

Set teg í samband við okkum. Um vit fáa nøkur stikkorð, so kunna vit í felag skriva greinina, sum verður meira áhugaverd at lesa, tá ið tit senda okkum eina mynd við. Tað sama kann gerast í samband við minningarorð.

Sosialurin "Nøvn í vikuni" Tel.341800 / 216135 Teldupost: maggi@sosialurin.fo


# Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu og hjálpsemi, tá okkara kæri maður, pápi, verpápi, abbi og langabbi

**Mourits A. Joensen**

andaðist og varð fylgdur til sín seinasta hvíldarstað.

Ein serlig tøkk til starvsfólkið á B6, Nærverkinum og til tykkum, ið hjálptu til við ervinum.

*Familjunnar vegna*
**Helena, Jens Pauli, Hannemia og Solina**


**Lutaseðil hjá Miðlahúsinum á ólavsøku**

**01020 ferðaseðil frá Atlantsflog**
**01155 ferðaseðil frá Atlantsflog**
**01217 vikuskifti fyri tvey og døgurði á Hotel Tórshavn**